gult cyan magenta svart



## TILTØK

## FØÐINGAR

5. mars fingu Lilian Kjærbo og Tryggvi Nielsen, Sumba, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3150 gr.

8. mars fekk Beinta Maria Olsen, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3000 gr.

13. mars fingu Daimi og Jan Djurhuus, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

15. mars fingu Oddvør og Emil Abrahamsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

16. mars fingu Kára Egilstrøð og Magnus Magnussen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3300 gr.

17. mars fingu Zaiton og Hanus á Krákusteini, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

18. mars fingu Conny og Johnny Thomassen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4000 gr.

18. mars fingu Mathilda og Oddur Lamhauge, Runavík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

19. mars fingu Vilbjørg M. Olsen og Eyðfinn Davidsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3050 gr.

21. mars fingu Beinta og Helgi Viðstein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

22. mars fingu Trine G. H. Fog-Petersen og Sverri J. Mortensen, Argjum, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4175 gr.

## ANDLÁT

**15.mars**
John Heinsen í Vági, 63 ára gamal.
Jona Olsen í Hvalba, 84 ára gomul.

**16. mars**
Hansina Joensen, Leirvík, 86 ára gomul.
Jógvan Berint Leiti, Fuglafjørður, búsitandi í Sønderborg, 17 ára gamal.

**17. mars**
Thea Jørgensen, Kvívík, búsitandi í Reykjavík, 74 ára gomul

**19. mars**
Ragnhild Djurhuus í Tórshavn, ættað av Hamri í Skálvík, 92 ára gomul.
Annette Wraae, Tórshavn, 45 ára gomul.
Johan Johansen, Tórshavn, ættaður úr Klaksvík, 86 ára gamal

**20. mars**
Jákup Olvhøj, 50 ára gamal.
Allan Sivanantham Jacobsen, lítli sonur Annettu og Shri í Miðvági, 6 ára gamal.

## BRÚDLEYP

Í dag, 24. mars, kl. 9.00 giftast í Vesturkirkjuni Ninna Reinert Hansen, Nes, og Oddmar Ørvarodd, Tórshavn. Eftir vígsluna verður vælkomst á Hotel Føroyum.

Leygardagin 21. apríl kl. 16.00 giftast í Bíggjar kirkju Gudny Heinesen, Bøur, og Erik Hansen, Miðvágur. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 9. apríl á tlf. 332803 ella 332702.

### Gudstænastur

***Miðføstusunnudagur***
*Haldarsvík:* Marjun Bæk kl. 12
*Tjørnuvík:* Inga Poulsen Dam kl. 12
*Kvívík:* kl. 17 føstugudstænasta: urguleikari Jón Magnus Joensen
*(Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar)*
*Glyvrar:* Meinhard Bjartalíð kl. 11
*Klaksvíkar sjúkrahús:* Hans Eiler Hammer kl. 10
*Norðoya Røktarheim:* Hans Eiler Hammer kl. 14.30
*Mikladalur:* Niels P. Danielsen og Peter O. K. Olofson kl. 12, altargongd
*Talvan gongur í øllum kirkjum í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar*
*Vágur:* Erland Beder kl. 11
*Havnar kirkja:* Sonja Klein kl. 11. Talvan gongur fyri Breyð til heimin
*Gjógv:* Emil Olsen kl. 12, messa
*Funningur:* Emil Olsen kl. 17, messa
*Eiði:* Martin R. Jacobsen kl. 12
*Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar – Breyð til heimin*
*Sjóvar kirkja:* Jógvan Fríðriksson kl. 12, altargongd
*Talvan gongur í Sjóvar prestagjaldi fyri Breyð til heimin*
*Sørvágur:* David Johannesen kl. 12
*Sandavágur:* David Johannesen kl. 18
*Elduvík:* Uni Næs kl. 12.
*Talvan gongur í Fuglafjarðar prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar*
*Hellur:* Martin R. Jacobsen kl. 19
*Funningsfjørður:* Emil Olsen kl. 19
*Elduvík:* Emil Olsen kl. 20.30
*Viðareiði:* Elsa Funding kl. 12
*Hvannasund:* Elsa Funding kl. 17
*Fríðrikskirkjan:* Kjartan Mørkøre kl. 11
*Talvan gongur í Nes prestagjaldi fyri Breyð til heimin*
*Selatrað:* Bergur D. Joensen kl. 12
*Hvalba:* Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* Konfirmatión. Petur Martin Rasmussen
*Húsavík:* Jákup Reinert Hansen kl. 12
*Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Breyð til heimin*
*Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar*

### Tíð til Gud

verður í Pálsstovu sunnukvøldið kl. 21.00. Talari hesaferð er Dánjal av Rana. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14: Sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn

Sunnudagin 25. mars í kl. 15.00 í KFUK: Limafundur.
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Havstein Ellingsgaard. Evni: Hugleiðingar frá stríðsárunum.

### Adventkirkjan

Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bøn fyri samkomuni, Paulus.
Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

### Frelsunarherurin, Tórshavn

Sunnudagin kl. 11: Møti. Sofus Steingrund talar. Kl. 13.30: Sunnudagsskúli. Kl. 18.00: Møti. Major Tjåland talar.

### Ebenezer

Sunnudagin: Kl. 10.00 minnismáltíð Harrans, kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Sunnudagin:
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 9.30 seminar fyri juniorleiðarar, kl. 16.00 seminar Ny Generation.
Sunnudagin kl. 11.00 morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 18.00 kvøldmøti v/ Flemming Berg.
Mánakvøldið kl. 20.00 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Meinigheitshúsið í Havn

Í kvøld kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 meinigheitsfundur, offurgongd.
Mánakvøldið kl. 19 LU-arbeiðið. Filmur: I skyggen af korset (2. partur). Kl. 20 venur Manskórið.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 17: Møti.

### Rhema á Hálsi

Í kvøld kl. 20 opið hús fyri ungdóm.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

### Aglow, Tórshavn

Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum í kvøld kl. 19.30, har Leif og Susanne Madsen úr Danmark, sum eru trúboðarar í Kenya, luttaka. Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Bahá'í Miðstøðin í Gundadali

Øll møti eru fyribils avlýst vegna umvæling.

### Kirkjan í Hósvík

Møti verður í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Talarar Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Filadelfia, Sundalagi

Sunnukvøldið kl. 18: Kvøldmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Mikudagin frá kl. 19–21.00: Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.
Hósdagin frá kl. 16–17.30: Urtagarðurin, eitt trivnaðarstað hjá børnum í Hósvík, frá kl. 18–19.00: Bønarmøti.

### Hvalvíkar missiónshús

Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti við Anniku og Sigrið við familju. Innsavnan til húsið, kl. 20.00: Ungdómsmøti v/ ungdómi av Argjum.

### Karmel, Eiði

Møti verður kvøld kl. 20. Vagn Foldbo talar, Trinitas syngja. Bønarløta kl. 19.30.
Sunnudagin: Skriftamál kl. 11.40, messa kl. 12, Emil Olsen. Sunnudagsskúli kl. 14.30, møti kl. 19.00, Ámundur Bertelsen talar, Teir fýra úr Havn syngja. Innsavnan til Karmel. Bønarløta kl. 18.30. Øll eru vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

***Hitt stóra boðið***

Tey tíggju boðini høvdu stóran týdning fyri jødafólkið, haðani vit hava fingið tey, og tey hava sama stóra týdning fyri okkum, sum í dag kalla okkum kristin, bæði sum tjóð og einstaklingar.

Í stuttum kann sigast, at trý tey fyrstu boðini viðvíkja viðurskifti okkara við Gud, hini sjey viðurskifti okkara við næstan. Ella fyri at gera tað meira viðkomandi: míni viðurskifti við Gud, og míni viðurskifti við onnur menniskju.

Jødarnir løgdu stóran dent á, at boðini skuldu haldast. Tað tók Jesus eisini dyggiliga undir við, og kirkjan hevur framhaldandi hetta sum ein aðaltátt í tí kristnu trúarlæruni.

Tíðarandin roynir dúgliga at gera sína ávirkan galdandi á kirkjuna og læruna, men vónandi stendur hon stinn á klettinum, sum hon hevur gjørt í øldir.

Teir lógkønu royndu eisini at freista Jesus, og ein teirra spurdi hann: Meistari, hvat er hitt stóra boðið í lógini? Men hann segði við hann: Tú skalt elska Harran, Gud tín, av øllum hjarta tínum og av allari sál tíni og av øllum huga tínum! Hetta er hitt stóra og fyrsta boðið. Men eitt annað er enn, ið er hesum líkt: Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg. Í hesum báðum boðunum hongur øll lógin og profetarnir. Og í fjallataluni sigur Jesus hesi kendu orðini, sum hava fingið heitið: hin gylta reglan: Alt tað, sum tit tí vilja, at menn skulu gera móti tykkum, tað skulu tit eisini gera móti teimum; tí at hetta er lógin og profetarnir.

Maður tosar við prest um ferð til hitt Heilaga landið. Errin sigur hann, at hann ætlar at fara upp á Sinai fjall og har lesa tey tíggju boðini hart fyri sær sjálvum. Ja, sigur prestur, tað er jú eisini mikið lættari enn at vera heima og halda tey.

Hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt lív? spurdi unglingurin. Vit kunnu einki gera, heldur ikki nakað gott, fyri at røkka hesum málinum. Men Jesus bað hann kortini halda boðini. Lætt er tað ikki, ja nærmast ómøguligt; men fylg mær, legði Jesus afturat, tá ungi maðurin ikki megnaði meira sjálvur. Jesus er vegurin, og aftur í fjallataluni sigur hann um hetta: trongt er portrið, og mjáur er vegurin, ið førir til lívs. Og til seinast sum svar uppá spurningin hesi kendu bíbilorðini: Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.

**Sigvald Kristiansen**



## TILTØK

### Bønhúsið í Søldarfirði

Mánadagin 26. mars kl. 19.30 samlast sjómanskvinnuringarnir í Søldarfirði, Lamba, Runavík og úr Gøtu í Bønhúsinum í Søldarfirði. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 17.00 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Húsmøti verður á Skipanesi týskvøldið kl. 19.00 hjá Irenu & Martin.
Verið hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði

Í kvøld kl. 21: Opið hús við Flemming Berg úr Danmark.
Sunnudagin kl. 17: Møti við Osbjørn og Eyðun.
Barnamøti kl. 17.

### Missiónshúsið í Leirvík

Í kvøld kl. 20 verður ungdómsmøti við Gudny og Jørgin.
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Jørmund Foldbo. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 14.00. Onki møti.
Mikudagin 28. mars: Bíbiltími kl. 20.00.

### Betania í Skopun

Sunnudagin: Sunnudagsskúli - Bíbliuflokkur kl. 10.15, morgunmøti kl. 11 og kvøldmøti kl. 18.
Øll eru vælkomin.

### Meginskúlin á Sandi

Evangeliskur fundur verður í Meginskúlanum á Sandi sunnudagin kl. 15. Sangkórið í Hebron á Argjum syngur og Svenning av Lofti o. a. tala.

### Zion á Sandi

Sunnudagin: Sunnudagsskúli kl. 13.30.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 14.00. Vegna missiónsviku í Vági verður einki møti sunnukvøldið.

### Missiónshúsið í Vági

Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við Regini Høgnesen, kór úr Skopun syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur

Sunnukvøldið kl. 18: Evangeliskt møti, Eingrím og aðrir tala. Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Mánadagin kl. kl. 18.00: Heimaforbundið.

### Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskur fundur.
Mánakvøldið kl. 20 bønarfundur.
Týskvøldið kl. 20 ungdómsfundur.
Ónskvøldið kl. 20 uppbyggingarfundur.

### Betania, Porkeri

Kvinnumøti verður mánakvøldið kl. 20.

### Soli Deo Gloria

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Lív og Dánial á Dul, einki ALPHA skeið.
Mánadagin 26. kl. 20 er møti við Leif og Susanne Madsen trúboðarar í Kenya. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR

Sunnudagin 25. mars verður gongutúrur fyri Vestan. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 15. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Tilmelding.

### Reyði Krossur Føroya

Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 24. mars: Hálvdan Simonsen, tlf. 441490
Sunnud. 25. mars: Magnus á Stongum, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21

Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 26. mars:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-12.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
Kortspæl, telving og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan mikudagin á tlf. 316491.
kl. 15.00 Vivian Gudmundarson frá pedagogskúlanum vitjar. Hugnaprát um látur.
*Týsdagin 27. mars:*
kl. 10.00-12.00 Vit baka
Kl. 15.00 Hugleiðingar um Havnina í 1920'unum (fyrri partur). Hjørdis Háberg
*Mikudagin 28. mars:*
kl. 10.00-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00 Døgurði (tilmelding mánad. 316491)
kl. 14.30 Túrur
*Hósdagin 29. mars:*
kl. 10.30-11.00 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Telduprát á 1. hædd, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 30. mars:*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### Vágs Matmøðrafelag

Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### AA-fundir í Havn

Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

### Al-anon

fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

### Javni N. Finsensgøta 32

Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

### AA-fundur í Eysturoy

Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn

er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

### LFÚ-skrivstovan

hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### LISA

skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo


